## Adressumálið – fjórði partur

# Nýtt paradigma

## Greinarøð



Hanus Kamban

### Mentanarstríðið

Í fyrsta parti av hesi greinarøð varð greitt frá tí embætismannavaldi, sum ráddi í Føroyum undir fyrra heimsbardaga, eitt vald, hvørs høvuðsmerkir vóru tann illa dámda grein sjey og amtmansins og próstsins støða á tingi sum ikki-valdir limir við atkvøðurætti. Í hesum fjórða og seinasta parti skal verða greitt frá, hvussu hetta vald fall.

Aftan fyri stríðið um grein sjey leikaði eitt stríð av meiri grundleggjandi slag, hvørs høvuðsspurningur var hesin: hvat mál skuldi vera mentanarmál føringa í framtíðini, móðurmálið ella danskt? Í sambandinum ráddi (tá nøkur fá eru undantikin) tann hugsan, at móðurmálið var eitt heimamál, ið hevði sama virði og somu tign sum eitt nú jútskt ella fynskt í Danmark, men at danskt var høvuðs- og kulturmálið.

Í sjálvstýrinum vóru fólk samsint og ivaleys í, at móðurmálið var mentanarmálið, framtíðarinnar mál, og øll orka og allur tokki hjá hesum fólkum vóru bundin at stríðnum til at búgva føroyskt til henda framtíðar leiklut.

### Tann ranga myndin

Hetta mentanarstríð bleiv hesi árini ført á øllum hugsandi hermótum, á gøtuni, á tingi, í bløðunum, á fólkafundum, í sjónleiki og skaldskapi. Sjónskast vóru bløðini, har blaðstjórin á Dimmalætting Oluf Skaalum og Kristin í Geil, blaðstjóri á Tingakrossi, seint og tíðliga høgdu eftir hvørjum øðrum.

Lesarin eigur at gera sær greitt, at fólk í sjálvstýrinum frá byrjan gjørdu tað púra greitt, at tað at tey hugsaðu sær føroyskt sum høvuðsmálið á ongan hátt merkti, at tey vóru ímóti donskum. Danskt skuldi vera tað fremsta fremmandamálið í føroyska skúlanum, og ruddilig undirvísing í donskum máli og bókmentum skuldi vera ein fastur táttur í skúlanum.

Men so lætt slapp sjálvstýrið ikki. So leingi sambandið hevði meiriluta á tingi og átti tey føroysku umboðini í ríkisdegnum, hevði sambandið møguleika at geva tí danska almenninginum *sína mynd* av sjálvstýrisins politikki. Og henda mynd var, sakliga sæð, eintáttað og bronglað. Ár eftir ár bleiv júkað, at sjálvstýrið vildi reka danskt mál úr Føroyum.

### Edward Mortensen mýkir danir

Umboð fyri sjálvstýrið høvdu lítlan møguleika at verja seg ímóti hesum rangsnúgvingum, og komu av tí sama í dýrastu neyð. Royndi onkur úr sambandinum at málbera seg varliga ella nýanserað, so vóru alt varsemi og allar nýansur burtur, tá ið teirra metingar, sum vanligt var um hetta mundið, vórðu tiknar uppaftur av donskum blaðmonnum ella politikarum.

Sjálvstýrismenn komu á henda hátt í tí danska almenninginum at standa sum fíggindar hjá donskum máli og danskari mentan, hóast veruleikin var tann, at teir ikki bara roknaðu danska andsmentan sum part av sínum førningi, men at teir í stóran mun vóru sprotnir úr einum donskum andaligum baksýni.

Tá ið Edward Mortensen í mai 1915 varð valdur inn í ríkisdagin, broyttist henda myndin. Nú hevði ein maður, sum í sínum hjarta var sjálvstýrismaður, og sum kendi viðurskiftini og høvuðspersónarnar út í æsir, høvi til, sitandi á fyrstu parkett, at greiða frá sjónarmiðunum hjá sær og lagsbrøðrum sínum. At Edward var ungur, vælvandur og gløggur, var honum sjálvsagt bara ein fyrimunur.

Tá ið menn sum H.P. Hansen komu við tí gamla sjabbinum um hatur til danskt, vísti Edward honum aftur sakliga og samstundis so dyggiliga, at har var ikki meira at siga. Edward Mortensen megnaði veruliga at gera mongum donskum politikarum greitt, at sjálvstýrisfólk ikki vildu donskum til lívs, at hetta bara vóru fólk, sum vóru góð við sítt land, sítt mál og sína mentan, og sum høvdu eina góða og rættvísa sak at berjast fyri.



C.Th. Zahle var danskur forsætisráðharri frá 1913 til 1920. Í hansara tíð var gott áralag millum ta donsku stjórnina og føroysk sjálvstýrisfólk



Á fólkatingsvalinum tann 22. apríl 1918 vann Andrass Samuelsen á Edwardi Mortensen

Sum longu nevnt var Edward í hugsan ein modernaður sosialliberalur politikari, og tá ið hann stýðjaði Teir Radikalu, gjørdi hann tað ivaleyst heilhugaður. Hann var endaður sum ein stuðul hjá tí radikalu stjórnini í eini vandafullari tíð, og hann fekk sín stuðul afturløntan.

### Eitt søguligt fjarrit

Ein heilt nýggj og øðrvísi støða hevði tikið seg. Fólk í tí radikalu Zahle-stjórnini førdu nú fram, ávirkað av sjarmu-átakinum hjá Edwardi Mortensen, at ein ikki átti at óttast sjálvstýrishugaðar føringar, tvørturímóti, ein átti at virða hesi fólk, sum høvdu tokka til sítt mál og sína mentan.

Og soleiðis gekk tað til, at tað almenna Danmark kom at standa undir liðini á sjálvstýrinum – ímóti Rytter og sambandinum. Henda nýggja og heilt øvugta støða kom at vera serliga sjónsk undan fólkatingsvalinum tann 22. apríl 1918. C.Th. Zahle læt tann 15. mars hetta árið fjarrita til Rytter, at hann í sínum bløðum m.a. hevði úttalað:

*Jeg ønsker Hr. Mortensen genvalgt, først fordi han er en dygtig Repræsentant for færøske Interesser, og saa fordi han er en paalidelig Støtte for Ministeriets Politik. Jeg ønsker naturligvis et Medlem til Landstinget, paa hvem dette kan anvendes. Det er galt at fortolke den Kærlighed, som Færingerne har til deres Hjemstavn og Sprog, som et Tegn paa Danskfjendtlighed. Vedligeholdelsen af det gode Forhold mellem Færøernes danske Borgere og os hernede beror meget paa vor Beredvillighed til at forstaa Færingernes Krav paa Frihed ...*

### Rytter ger bart

Zahle var ikki bara danskur forsætisráðharri, men samstundis eisini løgmálaráðharri við serligari ábyrgd fyri føroyskum viðurskiftum. Svenning Rytter var sum amtmaður í Føroyum beinleiðis undir Zahle. Ivaleyst hevur hann følt seg sum ein embætismann, sum stóð á varðhaldi fyri donskum áhugamálum í einum fjarum og lutvís fíggindaliga sinnaðum oyggjalandi.

Og nú fekk hann sendandi eitt fjarrit, har tað stóð svart upp á hvítt, at hansara egni harri og húsbóndi var farin í part við fíggindanum og enntá vildi hava hansara mótstøðumenn, Edw. Mortensen og Jóannes Patursson, valdar inn í ávikavist fólkatingið og landstingið.

Svenning Rytter gjørdi í hesi støðu ikki mætari enn at siga upp. Hann bað tann 17. mars um at verða loystur úr starvi og, um tað var gjørligt, fluttur í annað embæti. Men ikki nóg mikið við tí. Sorinskrivarin Thygesen og fútin Vest løgdu samstundis síni embætir niður og bóðu um at verða fluttir.

Hetta seinasta tykist, um ein í dag skal meta um tað, ógvuliga løgið. Rytter var embætismaður og politikari við atkvøðurætti á tingi, so hansara ónøgd við Zahle og hansara uppsøgn høvdu yvir sær eitt slag av skilvísi. Men Thygesen og Vest vóru óheftir og uttanveltaðir embætismenn og áttu als ikki at havt latið við seg koma. Høvdu teir kanska í roynd og veru ongantíð verið óheftir?

### Várvindar

Tá ið tíðindini um uppsagnirnar spurdust, var sigursrómur millum sjálvstýrisfólk. Við einum kasti sluppu tey av við tríggjar máttmiklar danskar embætismenn. Tað mundi vera mongum greitt, at víst fóru dugnaligir embætismenn aftur at koma til Føroya, men neyvan fólk av tí ráðaríka Rytter-slagnum. Og sama summar frættist, at blaðstjórin á Dimmalætting, Oluf Skaalum, fór at leggja sítt starv niður og flyta til Danmarkar. Um uppsagnirnar hjá Rytter, Thygesen og Vest skrivaði Kristin í Geil í Tingakrossi:

Sosialurin